# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# DREPA FÓLK HELDUR ENN HVAL

Vit kenna okkum lítil, tá tey stóru leggja trýst á okkum. Vit vita av royndum frá øðrum minnilutasamfeløgum, hvørja skaðiliga ávirkan tað kann hava, tá um hvørvisfelagsskapir fyrilitaleyst leggja trýst á handils- og vinnulív til tess at seta handilsforðingar í gildi.

Ein dagin fyrr í mánaðinum ringdi ein maður frá einum týskum náttúrufelagsskapi til okkum her á redaktiónini. Hann vildi hava eitt og annað at vita um grindadráp - og spurdi, um tað passaði, at grindamenn í Húsavík høvdu hildið eini grind um náttina við at binda hvalirnar fastar í bátarnar fyri síðani at drepa teir morgunin eftir. Slíkum kunnu vit grína eftir, men onnur taka hetta í álvara og trúgva slíkum søgum.

Ein annar maður úr Onglandi sendi okkum eitt brikslandi teldubræv herfyri - eisini um grindadráp. Hetta var meðan stríðið í Irak var upp á tað ringasta. Undirritaði kundi ikki lata vera við at svara, at hann skuldi venda aftur, tá hansara landsmenn ikki longur drepa fólk. Hann helt ikki, at hetta kundi samanberast. Men tað kann tað so avgjørt!

Stórabretland er eitt land, sum drepur fólk. Kanada, heimlandið hjá Paul Watson, er eisini eitt land, sum drepur fólk og sum ongantíð himprast við at fylgja amerikanarum út í víðu verð at drepa fólk. Frakland, heimlandið hjá Brigitte Bardot, drepur eisini fólk - og okkara egna kongaríki Danmark drepur eisini fólk.

Men almenna Føroyar drepur ikki fólk - og tað hava vit ikki gjørt í eini 200 ár. Men vit drepa grind. Vit drepa okkurt um eina promillu av grindahvalastovninum. Tað má vera stovnsrøkt, sum munar og sum er burðardygg. Men tað hevur helst ongan áhuga. Fyrilitið fyri náttúruni hevur valla heldur tann stóra áhugan hjá hesum náttúrumissiónerum. Heldur man tað vera spenningurin at sleppa á eina dramatiska ferð, sum er goldin av forkelaðum marglætisskrukkum, sum heldur áttu at nýtt peningin til at



hjálpa neyðstøddum kring heimin. Brigitte Bardot kundi so passandi brúkt sínar pengar at hjálpt fólkum á kyrrahavsoyggjum, sum Frakland hevur kryplað við kjarnorkuspreinginum.

»Verden er af lave« var heitið á eini skúlabók, og hetta danska orðatakið kunnu vit so mangan sanna. Hóast vit hava rætt, so vinna vit valla ljóð fyri okkara sjónarmiðum úti í verð. Men grindadrápið fer helst í søguna, tí at grind ikki er mannaføði - tí júst tey lond, ið nógv av hesum umhvørvisfólkum umboða, hava dálkað okkum havið so illa.

**» Tey drepa ikki hval. Men tey drepa fólk**

# Ljósið við zumbadansi í Vágsbotni

Fimleikaárið hjá Fimleikafelagnum Ljósinum byrjar við einum braki í Vágsbotni. Felagið fegnast um nýggju fimleikarhøllina í Gundadali. Tað eins og eitt nýtt tíðarskeið er byrjað innan fimleikin í høvuðsstaðnum, sigur Ann Hansen, formaður í Ljósinum.

Fimleikafelagið Ljósið leggur út við ein rættiliga spennandi og umfatandi skrá í vetur við m.a. Zumbadansi til bæði børn og vaksin eins og Power Fit og øðrum tiltøkum.

Ann Hansen frá Ljósinum sigur, at nú nýggja fimleikarhøllin FIMI er komin í Gundadali, er tað eins og eitt nýtt tíðarskeið er byrjað innan fimleikin í høvuðstaðnum. Høllin hevur rútmiskar hallir og amboðshøll við øllum hentleikum, ið krevjast í nútíðar fimleiki. Tey liðini hjá Ljósinum sum ikki eru í FIMI fara at halda til í nýggju hallunum í skúlanum við Løgmannabreyt, ið eisini hava bestu karmar at geva liðunum og íðkarunum.

Í sambandi við at vetrarskráin hjá Ljósinum byrjar aftur, verður ein sonevnd Zumbaevent á Nólsoyarpálstorginum í Vágsbotni, har vit kickstarta fimleikin í ár, sigur Ann Hansen, sum leggur dent á, at øll eru vælkomin til framførsluna og at fáa okkurt leskiligt aftaná Zumbadansin.

Zumbaevntið í Vágsbotni verður gjørt í samstarvi við Miðlahúsið og verður sent beinleiðis í Rás2. Fimleikaárið hjá Fimleikafelagnum Ljósinum byrjar leygardagin 28. august í FIMI, har tilmelding verður frá klokkan 10-12.

Rás2 sendir beinleiðis frá tiltakinum á Nólsoyarpálstorginum hósdagin 26. august eftir tíðindini kl. 16.





**» Carli-Kalkun skriver igen**

OLE WICH
KJAK Á SÍÐU 29



**» Royna ta fáa semju um makrelin**

KAJ LEO JOHANNESEN
KJAK Á SÍÐU 29

# Brúðarmynd í 90 ára føðingardagsgávu

Fyri einum ári síðan fingu Hanna Hansen og Magna Thomasen glaspláturnar við myndum, sum tiknar vórðu í Thule Bókhandli í Klaksvík í tíðarskeiðinum 1948 til 1956.

Í februar høvdu tær eina framsýning við umleið 800 myndum úr savninum.

Henda framsýning varð væl vitjað.

- Vit vóru nokkso bilsnar av, at fleiri fólk ongantíð høvdu sæð hesar myndir av sær sjálvum, sigur Magna Thomasen.

Á framsýningini var millum annað brúðarmyndin av Honnu og Henry Ziska, og tær fór at siga dóttrina Beintu frá hesi vøkru mynd.

- Hon kendi einki til nakra brúðarmynd av foreldrunum og bað um at fáa myndina at geva mammuni. Soleiðis kom brúðarmyndin frá 17. Desember 1955 av Honnu og Henry upp á veggin at hanga, tá ið brúðurin fylti 90 ár tann 26. juli 2010, sigur Magna.

Henry doyði í 2004.

Magna og Hanna hava nú fingið skannað alar umleið 5000 myndirnar úr Thule Bókhandli, og tað hevur mangan verið eit torført arbeiði. Pláturnar hava ligið á loftinum í bókhandlinum í eini 60 ár, og fleiri teirra eru skaddar av fukti, umframt at tær ikki hava verið rætt pakkaðar inn, so tær hingu saman. Nakrar eru brotnaðar.



*Brúðarmyndin av Honnu og Henry Ziska frá 1955 er nústaðni komin undan kavi*

Men nú eru myndirnar komnar til skjals, og tær eru farnar at skráseta myndirnar.

Fyri at fáa nøvn ella søgu til myndirnar hava tær eina framsýning um vikuskiftið í Skálanum. Framsýningin verður fríggjdagin til sunnudagin frá kl. 16 til 20.

**Sosialurin** Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

*__Haldarar,__ sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*